FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# PHD-SKEIÐ

Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA
- várið 2009

## HEITI: HAV OG VEÐURLAG

**Lestrarstig**
7,5 ECTS

**Upptøkukrav**
Bachelor heiti í náttúruvísind (ella samsvarandi)

**Endamál**
At geva eina breiða lýsing av tí leikluti, sum havið hevur í veðurlagsskipanini; hvussu havið verður ávirkað av náttúrligum og mannaelvdum veðurlagsbroytingum, og hvussu tað er við til at gera og ávirka hesar broytingar.

**Ábyrgd av phd-skeiðnum**
Bogi Hansen, professari við Fróðskaparsetur Føroya

**Skeiðsstað**
Fróðskaparsetur Føroya, Náttúruvísindadeildin, Nóatún 3, 100 Tórshavn

**Skeiðsbyrjan**
Vika 5/2009

**Evni**
Skeiðið verður skipað eftir bókini "The oceans and climate" hjá Grant Bigg, men verður útbygt við brotum úr IPCC frágreiðingini frá 2007 og vísindaligum ritgerðum. Viðgerðin er heimsumfatandi, men við serligum denti á havleiðirnar kring Føroyar.

**Innihald:** Veðurlagsskipanin, sambandið millum hav og luft, havsúrgan, ENSO, NAO, AMO, AO, havið og náttúrligar veðurlagsbroytingar, havleiðirnar kring Føroyar í veðurlagshøpi, termohalint rák og veðurlag, rákini tvørtur um Grønland-Skotlands ryggin, Arktis, náttúrlig og mannaelvd ávirkan á veðurlagið, komandi veðurlag.

**Undirvísing**
60 fyrilestrar + umrøða av frágreiðingum og framløgum.

**Døming**
Skeiðið verður mett sum *Staðið* ella *Ikki staðið*. Tvær ferðir undir skeiðnum og eina ferð aftaná lata tey lesandi inn frágreiðingar og hava eina framløgu um uppgivin evni. Verða hesi øll góðkend, er skeiðið staðið.

**Arbeiði**
Tey lesandi mugu rokna við at brúka 200 tímar (íroknað fyrilestrar, frágreiðingar, framløgur og fyrireiking).

**Tilmelding**
Tilmelding á setur@setur.fo áðrenn 20. januar 2009 (Tikin útbúgving skal upplýsast).

Nágreiniligari upplýsingar um skeiðið eru at fáa á Setursskrivstovuni. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Grundskeið í lóg á Fróðskaparsetri Føroya

Í vár verður væl umtókta Grundskeiðið í lóg aftur á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

Grundskeið í lóg er partur av samfelagsútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum.

Skeiðið er eisini ætlað fólki, ið ikki eru lógkøn (ikki hava cand. jur. ella líknandi útbúgving) og vilja menna kunnleika sín til løgfrøðiligt háttalag og fáa betri fatan av lógum og juridiskum teksti.

Undirvíst verður tvær ferðir tríggjar tímar aðru hvørja viku, mánadag og mikudag, kl. 10.00 – 13.00.

Skeiðið byrjar mánadagin 9. februar 2009 og endar við eini 4-tímars skrivligari próvtøku mikudagin 27. mai 2009.

Dentur verður lagdur á praktiska almenna fatan av lógkunnleika, serliga at finna og tulka lóg, men í serliga partinum verður hugt nærri at evnum innan stjórnarlóg og fyrisiting.

Fróðskaparsetrið hevur í nøkur ár boðið skeiðið út, og tilsamans sjey flokkar hava lokið prógv. Sera stórur áhugi hevur verið fyri skeiðnum.

Ábyrgd av skeiðnum hevur Kári á Rógvi LL.M., lektari í løgfrøði.

Fyri uttansetursfólk (tey, ið ikki lesa á Fróðskaparsetrinum) verður skeiðsgjald kravt, kr. 8.000 fyri skeiðið, íroknað skeiðstilfar og próvtøkugjald.

Umsókarblað fæst við at venda sær til Søgu- og samfelagsdeildina, J. Broncksgøta 25, 4.h., tlf. 352580. Víst verður eisini til heimasíðuna: www.setur.fo

**Umsóknarfreistin er sett til mánadagin 26. januar 2009.**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

# Hagafundur

## fyri Innastahaga í Skálavík

Hagafundur fyri Innastahaga verður á Keldu leygardagin 31. januar 2009 kl. 20.00.

Um fundurin ikki er viðtøkuførur, verður nýggjur eykahagafundur lýstur at verða kl. 20.30 sama dag.

1) Framløga av roknskapi
2) Val av hagastýri
3) Ymiskt

***Hagastýrið***

Lesið Sosialin -so eru tit við!

**Dagstovnin á Argjum**
Traðagøta 55 · 160 Argir

# Pedagogar

## til Dagstovnin á Argjum

Vísandi til Dagstovnalógina søkir Dagstovnurin á Argjum eftir pedagogum bæði til vøggustovu og barnagarð at byrja 1. mars 2009 ella eftir nærri avtalu.

Møguleikar eru eisini fyri at kunna arbeiða niðursetta tíð.

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, leiðara á telefon 219019. Kunning er eisini á heimasíðu okkara www.dstargir.fo

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum, Traðagøta 55, 160 Argir, og vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin 30. januar 2009.

# Kunningarfundur

## um ES-skipanina á útlendingaøkinum

Útlendingastovan skipar fyri almennum fundi í Norðurlandahúsinum týsdagin 20. januar, har starvsfólk frá danska Udlændingeservice greiða frá ES-skipanini og hvussu hon virkar.

Kunningin er serliga ætlað teimum arbeiðsgevarum, fakfeløgum og myndugleikum, ið hava við arbeiðsmegi úr ES at gera, men tiltakið er alment og tilmelding er ikki neyðug.

Fundurin verður í Skálanum í nýggju Athøllini í Norðurlandahúsinum frá kl. 9 til 12.

**Útlendingastovan**
Niels Finsensgøta 10, 3. hædd
Tel. 357979 · Postboks 220
100 Tórshavn

# Bilur til sølu




**Ring 284444**